## Verður kanska latin leys

Maxine Carr, sum er skuldsett fyri at hava givið bretsku løgregluni skeivar upplýsingar í sambandi við gentumorðini í býnum Soham herfyri, fer nú at biðja um at sleppa úr varðhaldinum.

Verji hennara, Roy James, sigur við løgfrøðiliga tíðarritið The Law Gazette, at hann fyrireikar seg til at biðja rættin lata Maxine Carr leysa ímóti einum ávísum gjaldi.

Ian Huntley, sum er skuldsettur fyri at hava myrt tær báðar tíggju ára gomlu Jessicu Chapman og Holly Wells, er farin í hungursverkfalli. Sambært løgregluni hevur hann einki etið seinastu níggju dagarnar.

## Fullir sjómenn

Danska løgreglan noyddist fyrrakvøldið umborð á eitt norskt skip eftir trimum polskum sjómonnum, sum høvdu hótt hinar av manningini.

Norska skipið, sum eitur »Nor Hav«, fór inn til Rønne á Bornholm við monnunum. Sambært skiparanum høvdu menninir hótt hinar av manningini, og ein teirra hevði sligið ein av sínum skipsfeløgum.

Teir tríggir pólendingarnir vórðu settir í brummuna í Rønne, men eru síðani sendir til Pólands. »Nor Hav« er farmaskip, sum siglir millum Kiel og Riga.

## Brixtofte roynir seg aftur

Fyrrverandi borgarstjórin í danska býnum Farum fer nú at royna at fáa limaskapin í flokkinum Vinstra aftur. Mánadagin skal hann royna at verja seg á einum fundi hjá valfelagnum í Farum.

Á fundinum fer Peter Brixtofte at verja tað, sum hann gjørdi tey árini, hann var borgarstjóri í Farum. Aftaná verður orðaskiftið um verjurøðu hansara, men hesum sleppur Brixtofte ikki at taka lut í.

Hann hevur eisini ov mikið at verja. Í vikuni komu menn fram á útreiðslur fyri 88 milliónir krónur, sum kommunan í Farum hevur goldið, men sum bara fá ella kanska eingin vistu um uttan fyrrverandi borgarstjórin.

## Filmaði sína egnu neyðtøku

Ein 38 ára gamal norðmaður hugsaði seg ikki nóg væl um, tá hann tann 1. juni neyðtók eina 16 ára gamla gentu í býnum Namdal. Eitt var, at hann neyðtók gentuna, men tá gentan meldaði tilburðin, og løgreglan fór at vitja mannin, funnu løgreglumenninir eina sjónbandsupptøku, sum maðurin hevði tikið av neyðtøkuni. Sjónbandið vísti, at gentan royndi at berjast við mannin, men at hon var ov drukkin til at gera nakra veruliga mótstøðu.

Sjónbandi varð nýtt sum prógv í rættinum, sum eftir lítlari løtu dømdi mannin sekan. Hann skal nú sita tvey ár og fimm mánaðir í fongsli.

# Irak gloppar dyrnar



*Irakski varaforsætisráðharrin Tariq Aziz tosar við ST-aðalskrivaran Kofi Annan á toppfundinum í Johannesburg*

**Irak er til reiðar at samstarva við ST, men vil eisini hava nakað burtur úr samstarvinum**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Irakski varaforsætisráðharrin, Tariq Aziz, sigur nú, at Irak er til reiðar at samstarva við St fyri at fáa enda á ótryggu viðurskiftunum, sum hava valdað, síðani amerikanska stjórnin kom við hóttanini um at leypa á landið .

Á einum fundi við ST-aðalskrivaran, Kofi Annan, í Johannesburg segði Aziz, at Irak er sinnað at tosað við ST og at samstarva við heimsfelagsskapin, men hann legði dent á, at Irak má eisini fáa nakað burtur úr samstarvinum. Tariq Aziz nevndi m. a. handilstiltøkini, sum ST setti í gildi ímóti Irak eftir Flógvakríggið, og sum sambært irakum hava kostað túsundtals sivilum irakum lívið hesi tíggju árini.

Irsksku myndugleikarnir vilja m. a. vera við, at fleiri túsund børn eru deyð, tí landið fær ikki nóg mikið av heilivági. Ein annar trupulleiki er, at drekkivatnið er ov skitið, tí landið fær ikki tey neyðugu evnini til at reinsa vatnið við.

# Almenn serbisk frágreiðing avsannar Screbrenica-hópmorðið

**Ein nýggj almenn serbisk frágreiðing avsannar, at serbar framdu hópmorð við bosniska býin Screbrenica í 1995**

BALKAN
*Árni Joensen:*

Ein nevnd, sum stjórnin í tí serbiska partinum av Bosnia hevur sett, hevur skrivað ta nýggju frágreiðingina. Nevndin vísir aftur vesturlendskum metingum, sum siga, at serbar beindu fyri umleið 8.000 bosniskum muslimum, eftir at serbiskir hermenn høvdu tikið býin Screbrenica, sum var undir ST-eftirliti.

Frágreiðingin sigur, at umleið 2.000 muslimskir hermenn doyðu í bardøgunum við býin.

ST og Reyði Krossur hava sagt, at nógv av teimum deyðu vóru sivilfólk, yvirhøvur dreingir og eldri menn, og at teir vórðu skotnir í tí ringasta hópmorðinum í Evropa síðani seinna heimsbardaga. Bosnisku muslimarnir vilja vera við, at 7.942 dreingir og eldri menn hvurvu, men tey, sum sluppu livandi frá tilburðinum, vilja vera við, at serbisku hermenninir beindu fyri meiri enn 10.000 fólkum.

ST hevur ákært serbiska generalin Ratko Mladic fyri hópmorðið í Screbrenica, men hóast krígsbrotsmannadómstólurin í Haag hevur kravt at fáa generalin útflýggjaðan til rættarsókln, er hann framvegis ikki tikin.

# Sýta fyri at steðga sjálvmorðsatsóknum

**Teir víðgongdu palestinsku bólkarnir sýttu í gjár fyri at gevast við álopunum á ísraelsk mál**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*

Seinastu tíðina hevur palestinski innanríkisráðharrin, Abdel-Razzak al-Yahya, roynt at fáa teir víðgongdu palestinsku felagsskapirnar at gevast við álopunum á ísraelsk mál. Sambært ráðharranum er hetta alneyðugt, skal tað eydnast at fáa eina loysn á kreppuni, sum nú hevur vart í næstan tvey ár.

Men í gjár fekk ráðharrin svar, tá bólkarnir boðaðu frá, at teir eru ikki sinnaðir at steðga álopunum á Ísrael ella á ísraelsk mál. Felagsskapirnir, sum ætla at halda fram við álopunum, eru Hamas, Islamskt Kríggj, Fólkafylkingin til frígering palestinanna og al-Aqsa Brigadurnar.

Palestinski innanríkisráðharrin hevur serliga roynt at fáa teir víðgongdu felagsskapirnar at gevast við sjálvmorðsatsóknunum í Ísrael, men heldur ikki hendan áheitan hansara fekk undirtøku frá teimum fýra felagsskapunum.

Ísraelski hægstirættur staðfesti í gjár, at myndugleikarnir hava heimild til at flyta tveir palestinar burtur av Vestara Áarbakka, tí tey eru skyldfólk hjá monnum, sum ísraelsmenn leggja undir at hava lagt ætlan um álop í Ísrael. Palestinski ráðharrin Saeb Ereket legði hægstarætt undir at bróta altjóða reglurnar um mannarættindi.



# Skulu øll gjalda til fólkakirkjuna

**Fleiri av limunum í samgonguni, sum ikki hoyra til fólkakirkjuna, meta tað vera rímiligt, at limirnir í fólkakirkjuni sjálvir bera kostnaðin av kirkjuliga virkseminum hjá fólkakirkjuni, tá hon verður yvirtikin. Tað gera fólk í øllum øðrum trúarsamfeløgum, vísa samgongulimirnir á. Kirkjan sjálv tekur har aftur ímóti undir við orðunum í samgonguskjalinum um at landskassin skal bera meirkostnaðin**

FÓLKAKIRKJA
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Hvør skal gjalda tær 13 milliónir krónurnar, sum yvirtøkan av fólkakirkjuni fer at kosta – kirkjufólkið sjálvt ella landskassin, tvs. allir skattaborgararnir? Uppskotið til eina nýggja kirkjulóg, sum ein arbeiðsbólkur lat úr hondum í august mánað í fjør, leggur upp til, at meirostnaðurin skal gjaldast umvegis kirkjuskattin. Arbeiðsbólkurin metti tá, at fyri at bera kostnaðin var neyðugt at hækka kirkjuskattin umleið 0,4 prosent. Og arbeiðsbólkurin metti somuleiðis, at rættast er at halda fast við verandi skipan við kirkjuskattinum, tvs. at fólk, sum ikki eru limir í fólkakirkjuni, kunnu sleppa undan at gjalda kirkjuskatt, ynskja tey tað.

Men í samgonguskjalinum stendur tvørturímóti, at yvirtøkan og framtíðar raksturin av fólkakirkjuni skal gjaldast úr landskassanum, tvs. umvegis vanliga skattin. Tað merkir, at øll, eisini fólk uttan tilknýti til fólkakirkjuna, skulu gjalda til kirkjuna. Hesum sjónarmiði tekur kirkjan sjálv undir við.

Bjarni Bæk, dómpróstur, tekur undir við orðunum í samgonguskjalinum um at landskassin skal gjalda tað, sum danir í dag lata til kirkjuna. Hann heldur tað vera rímiligt, at øll, eisini tey sum ikki eru limir í kirkjuni, eru við til at bera kostnaðin. Bjarni Bæk er ikki samdur við teimum, sum føra fram, at limirnir í fólkakirkjuni sjálvir skulu bera allan kostnaðin av kirkjuni, t.d. umvegis kirkjuskattin. Hann vísir á, at fólkakirkjan er ein umfatandi stovnur, sum hevur nógvar, bæði kirkjuligar og mentanarligar uppgávur, sum øll hava gagn av. Tí metir hann tað vera rímiligt, at tann parturin, sum í dag verður fíggjaður úr Danmark, í framtíðini verður goldin av landskassanum, tvs. øllum skattaborgarum.

- Fólkakirkjan røkkur langt út í samfelagið, og stendur fyri nógvum virðum í samfelagnum, eisini mentanarligum virðum, og tí átti samfelagið at havt áhuga í at halda hesi virði við líka, sigur Bjarni Bæk, sum sostætt ikki heldur tað vera skeivt, at landskassin skal vera við til at rinda fyri kirkjuna.

Sum er letur landskassin tríggjar milliónir krónur til fólkakirkjuna sum skulu nýtast til rakstur og viðlíkahald av kirkjunum. Harumframt fær kirkjan góðar 13 milliónir krónur úr Danmark, av hesum koma 9,2 milliónir krónur, 60 prosent av prestalønunum, úr felags grunninum (Fællesfonden) hjá donsku fólkakirkjuni.

Bjarni Bæk dugur ikki at meta um, hvørt tað er eitt gott hugskot at býta virksemið hjá kirkjuni upp, ella møguliga flyta onkrar uppgávur, t.d. skráseting av fólki, frá kirkjuni til annan stovn, men hetta eru uppgávur, sum kirkjan hevur røkt frá gamlari tíð, vísir hann á. Dómprósturin heldur ikki at tað er í stríð við fólkaræðið, at fólk, sum onki samband hava við fólkakirkjuna, men í staðin gjalda til aðra samkomu, skulu noyðast at gjalda til fólkakirkjuna. Bjarni Bæk metir, at luturin hjá kirkjuni í samfelagnum er av slíkum tídningi, at tað er rætt at øll eru við til at bera kostnaðin av henni, sjálvt um tey ikki eru limir. Hann vísir eisini á, at kirkjuskatturin, sum vit kenna hann í dag, umframt aðrar innsavnanir í til kirkjuna, fara at verða varðveiddar, tá kirkjan verður yvirtikin.

Í samgonguni eru fleiri persónar, sum ikki eru limir í fólkakirkjuni, men ístaðin í øðrum trúarsamfeløgum. Teirra persónliga áskoðan er, at kirkjuliga virksemið hjá fólkakirkjuni eigur at gjaldast av teimum, sum nýta kirkjuna. Haraftur-ímóti skulu øll vera við til at gjalda fyri tær samfelagsligu uppgávur, sum fólkakirkjan í dag røkir.

Samgongutingmenninir Jógvan við Keldu, Jógvan á Lakjuni og Jenis av Rana og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Karsten Hansen, hava tað til felags, at ongin teirra er limur í fólkakirkjuni. Jenis av Rana er partur av fríkirkju, meðan hinir tríggir eru partur av Brøðrasamkomuni. Sosialurin hevur spurt teir um teirra persónligu meining um spurningin, hvør skal gjalda kirkjuna.

Lesið meira á síðu 5

Karsten Hansen:

## Kirkjufólkið gjalda kirkjuliga virksemið



Karsten Hansen er av tí persónligu áskoðan, at er ein góður við kirkjuna, og kennir seg sum ein part av henni, so eigur at bera til at gjalda eitt sindur til hana. Karsten Hansen vísir á, at innan Brøðrasamkomuna, sum hann sjálvur er partur av, verður ikki kravt nakað ávíst gjald, men at har er tað upp til hvønn einstakan, hvussu nógv hann ella hon letur til samkomuna. Tað er ein skipan, sum fólk eru glað fyri. Hann leggur tó afturat, at er kirkjan ikki sjálv før fyri at gjalda sínar útreiðslur, so hava vit ein trupulleika. Karsten Hansen sigur seg tó ikki heilt kunna skilja, at limirnir í fólkakirkjuni ikki skulu kunna gjalda eitt sindur meira í kirkjuskatti. Hann slær tó fast, at sjálvsagt skulu uppgávurnar, sum kirkjan ger fyri øll, gjaldast av øllum.

- Men mín persónliga meining er, at tað hevði verið rættari, at kirkjuliga virksemið hjá kirkjuni varð goldið av kirkjuni sjálvari, sigur Karsten Hansen.

Karsten Hansen vísir á, at samfelagsligu skyldurnar hjá kirkjuni, sum helst eru komnar í lag av søguligum orsøkum, í ávísum føri kunnu vera ein innfaldsvinkul hjá kirkjuni at koma í samband við tað einstaka menniskja. Tí er hann ikki so vísur í, at tað hevði verið skilagott at flutt uppgávur, t.d. at føra kirkjubøkurnar, frá kirkjuni til onkran almennan stovn at røkt.

Jógvan við Keldu:

## Býtislykil gerast fyri kirkjuligar útreiðslur



Hóast hann ikki sjálvur er partur av fólkakirkjuni, metir samgongutingmaðurin Jógvan við Keldu kirkjuna at hava stóran týdning fyri føroyska samfelagið. Jógvan við Keldu metir persónliga, at tað er skeivt, at fólk, sum hoyra til aðrar samkomur, skulu gjalda til fólkakirkjuna. Tó vísir hann á aðrar uppgávur og virði, sum kirkjan hevur í samfelagnum, og tað skulu øll vera við til at gjalda.

Jógvan við Keldu býtir spurningin um fíggingina av kirkjuni upp í tríggjar partar. Fyri tað fyrsta er tað tann mentanarliga uppgávan hjá kirkjuni, har t.d. kirkjurnar kring landið og søguliga virði teirra verða vístar fram fyri ferðamanninum sum ein partur av føroysku mentanini. Harumframt hevur kirkjan onnur søgulig virði, sum hava verið grundleggjandi fyri samfelagið og sum fara longur aftur í tíðina. At varðveita hetta er nakað, sum alt samfelagið fær gagn av og tí eisini eigur at verða goldið úr landskassanum, metir Jógvan við Keldu. Síðan er tað samfelagsligu uppgávurnar hjá kirkjuni, t.d. at skráseta allar føroyingar, tá teir koma til verðina og tá teir fara hiðani. Hesar uppgávur heldur Jógvan við Keldu við tíðini eiga at verða fluttar burtur frá kirkjuni til annan stovn at røkja, og útreiðslurnar eiga eisini at verða goldnar úr landskassanum. Til seinast er tað kirkjuliga, andaliga virksemið hjá fólkakirkjuni, og tað eigur at verða fíggjað umvegis kirkjuskattin, metir tingmaðurin.

Jógvan við Keldu heldur tað vera rættast at býta virksemið hjá kirkjuni upp í nevndu tríggjar partar, tí á tann hátt ber til at vísa á, hvat pengarnir, sum verða játtaðir av fíggjarlógini til kirkjuna, verða nýttir til. Hann sigur, at tey, sum vara av kirkjuni, myndugleikar, prestafelag osv. í felag eiga at finna út av einum býtislykli fyri almennu játtanina til kirkjuna, bæði fyri at tryggja at kirkjan ikki einsamøll ber kostnaðin av tí, sum allir borgarir hava nyttu av, og í øðrum lagi fyri at tryggja, at fólk uttanfyri fólkakirkjuna koma at gjalda fyri andaliga virksemið hjá fólkakirkjuni.

Jógvan við Keldu metir, at føroyingar mugu gera sær greitt, hvussu fólkakirkjan skal síggja út, áðrenn hon verður yvirtikin. Hann heldur tað vera skeivt, sum í ført hevur verið fram frá politiskari síðu, at vit fyrst skulu yvirtaka kirkjuna, og síðan finna út av, hvat vit vilja við henni. Tað er tann øvugta mannagongd, metir Jógvan við Keldu. Hann leggur afturat, ar kensluliga er kirkjan ikki tað sama at yvirtaka sum t.d. Skipasýnið ella Postverkið í síni tíð. Tí hevur tað stóran týdning at arbeiðið verður væl fyrireikað og at allir partar innan kirkjuna kenna seg aftur í arbeiðinum.